Helena fær hægri játtan

John Johannessen

Almanna- og heislumál fara næsta ár at fáa væl hægri játtan, enn tey fingu á fíggjarlógini fyri ár 2000.

Hetta sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, í sambandi við, at landsstýrið í løtuni arbeiðir við fíggjarlógaruppskotinum fyri ár 2001.

Skúlamál fáa eisini hægri játtan, og kemst hetta millum annað av, at læraralønirnar eru hækkaðar.

Karsten Hansen vísir á, at í prosentum kann tað fara at tykjast, sum um oljumál fáa nógv hægri játtan enn í ár, men kemst hetta av, at Oljumálastýrið nú eisini skal umsita tey mál, ið hava við jarðfrøði at gera.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vil ikki koma nærri inn á, hvussu høgar játtanirnar til ávísu málsøkini fara at verða í fíggjarlógaruppskotinum fyri ár 2001. Men tað er kortini greitt, at fíggjarlógin fyri næsta ár verður hægri enn verandi fíggjarlóg.

Sjálvstýrisflokkurin á netinum

John Johannessen

Tingakrossur, sum fram til áttatiárini var blað Sjálvstýrisfloksins, er nú komin út aftur í elektróniskari útgávu.

Sjálvstýrisflokkurin hevur gjørt sær heimasíðu, har høvuðssíðan er ein internetútgáva av Tingakrossi. Á hesi høvðussíðu eru greinar frá politisku manning floksins.

Harafturat ber til at koma frá høvðussíðuni inn á eina undirsíðu, ið kallast heimasíðan hjá Sjálvstýrisflokkinum. Her ber millum annað til at heinta sær upplýsingar um ting- og landsstýrismanning floksins.

Sjálvstýrisflokkurin er fimti politiski flokkurin í Føroyum við heimasíðu. Hinir flokkarnir á netinum eru Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og miðflokkurin.

Heimasíða Sjálvstýrisfloksins er at finna á www.tingakrossur.fo

Sáttmálin uppsagdur

Maskinmeistarafelagið hevur nú sagt upp sáttmálan við Føroya Reiðarafelag.

Sáttmálin, sum umfatar maskinmeistarar við føroyskum fiskiskipum, fer úr gildi tann 1. desember í ár..

Tryggingarfeløgini ábyrgdarleys

Kappingin millum Trygd og Tryggingarfelagið førdi við sær ábyrgdarleysar dumpingprísir. Rokningina fáa allir bilaánarar at býta sínamillum

Eirikur Lindenskov

Stokkut var gleðin hjá bilánarum, tá tryggingarmonopolið varð tikið av fyri hálvum øðurm ári síðani.

Tá Føroya Banki yvirtók tryggingarfelagið Trygd - og eisini fór at bjóða biltryggingar, vaknaði tryggingarrisin á Kongabrúnni í Havn sum við kaldan dreym. Tá stutt tíð var fráliðin kundi tryggingartakarar sanna. at vit nú høvdu fingið tryggingarfeløg, ið settu tryggingartakaran í hásæti.

Tilboðini gjørdust fleiri og fleiri - og fólk vóru farin at tosa um, at vit í Føroyum hava heimsins bestu biltrygging.

Men so skuldi ikki vera. Fyri vikum síðani boðaði Trygd frá, at teir høvdu brent seg við at bjóða alt ov bíligar tryggingar, og í gjár segði stjórin á Tryggingarfelagum Føroyar við útvarpið, at teir longu tá vistu, at prísirnir, teir bjóðaðu, vóru alt ov lágir.

Men tryggingartakarin óraði einki ilt.

Frá 1. oktober hækkar Tryggingarfelagið Føroyar skrokktryggingarnar við 20% og ábyrgdartryggingarnar við 30%. Hevur tú báðar tryggingarnar, sleppur tú tó við at rinda 20% meira.

Í kappingini við Trygd kom Tryggingarfelagið Føroyar við fleiri nýggjum tryggingum. Ein var fastgjaldsskipanin, har tú ikki misti bonus, men mátti rinda 3.000 krónur í sjálvsábyrgd av hvørjum skaða. Umframt at henda trygging dýrkar, hækkar sjálvsábyrgdin eisini upp í 3.600 krónur.

Afturat hesum boðar Tryggingarfelagið Føroyar frá, at tryggingargjøldini verða prístalsviðgjørd, so tey hækka í samsvar við lønar- og útreiðsluvøkstur annars.

Annað nýtt tilboð frá Tryggingarfelagnum Føroyar var endurgjald fyri bilsákn. Tá fekst tú 10% av skaðaupphæddini útgoldið sum plástur á sárið fyri ongan bil at hava, meðan hann var til umvælingar. Nú krevur Tryggingarfelagið, at hesar útreiðslur skulu skjalprógvast.

Gunnar í Liða, stjóri á Tryggingarfelagum Føroyar segði við útvarpið í gjár, at hækkingarnar eru úrslit av dumpingprísum sum úrsliti av kappingini. Hann segði, at hetta var ábyrgdarleyst, men at Tryggingarfelagið Føroyar var noytt at fylgja við.

Skaðatølini fyri fyrra hálvár í ár eru sera ljót og vísa stórt undirskot.

Hon svam næstan í pottin

Hvør einasti klaksvíkingur fekk part og havnamenn vóru leskaðir við finningarfiskinum

Justinus Leivsson Eidesgaard

Hon svam næstan í pottin. Sunnumorgunin lá ein grind á pollinum í Klaksvík, beint uttanfyri Kósabrúnna. Ivaleyst hava fleiri sæð hana, men útróðrarbáturin Sjófrúgvin úr Klaksvík var fyrstur hjá henni og fekk tí finningarfiskin.

"Nógv fólk var hjástatt, meðan grindin var hildin til. Drápið gekk rímuliga væl. Ikki øll grindin gjørdi landgongd og ein partur mátti rekast inn aftur," sigur Høgni í Dali, løgreglumaður í Klaksvík.

Merktir vóru 98 hval upp á tilsamans 937 skinn. Allir Klaksvíkingar fingu at kóka. Heimaparturin var umleið 0.3 skinn og drápsparturin eitt sindur størri. Skjótt gekk at merkja grindina og longu klokkas seks sunnukvøldið komu seðlarnir út.

Nordingar hava verið hepnir við grind seinastu tíðina. Í seinastu viku legði ein grind beinini norðuri í Sundum og ein springarabólkur legði beinini í Klaksvík.

Viðmerking:

Roknskaparlógin

Flest øll taka undir við, at ov fáir handlar viðførur vánaliga tænastu, minni úrval og høgar prísir. Men tey flestu vita ikki, at um vit hava ov nógvar handlar verður sama úrslit. Hetta kann ikki passa, vil onkur verða við. Men tíverri er tað so. Samlaða keypiorkan er tann sama. Og tí verður úrslitið av ov nógvum handlum, at samlaðar útreiðslur verða hægri. Handlar hava umleið somu nøgd á hyllini totalt, og tí hevur hvør handil minni. Tó hava allir tað, sum mest verður selt av, og tí verða færri vørusløg totalt. Sølan verður minni pr. handil. Talið av starvsfólkum veksur, men førleikin hjá miðal starvsfólkinum minkar vegna væntandi upplæring. Ergo, tænastan lækkar, prísir hækka og úrval minkar.

Neyðugt at broyta roknskaparlógina

Eitt sum kundi bøtt um hetta er, at roknskaparlógin bleiv broytt, soleiðis at allar fyritøkur skuldu upplýst umsetning í roknskapinum. Í dag er alt ov lætt at krógva tøl. Hetta kann gerast sambært roknskaparlógina fyri at verja fyritøkur móti kapping. Men tað átti at verið sett spurnartekin við hesa reglu. Lógin er kopi av danskari lóg, og tey virkini eru so stór, at øll okkara koma undir smá virkir. Í Danmark eru stór virkir í øllum vinnugreinum, og tí ber til hjá øllum at síggja, hvussu gongdin er. Um lógin bleiv broytt, soleiðis at øll feløg vístu samlaða sølu, og síðan koyrdu vørunýtslu og fastar útreiðslur undir ein post, var framvegis nógv krógva. Men tá kundu øll rokna seg fram til støddina av einum ávísum marknaði. Roknskaparlógin er tí ein forðan fyri, at øll kunnu fáa innlit í føroyskt vinnulív.

Í dag er tað bert Føroya Banki, sum hevur innlit í raksturin av handlum og fyritøkum. Teir hava sjálvandi tagnaðarskildu,

Ávísar broytingar av roknskaparlógini høvdu gjørt, at øll fingu betri innlit í vinnulívið. Hetta hevði eisini gjørt at øll, sum umhugsa at byrja ein fyritøku kundu gjørt eina veruliga ætlan. Í dag verður mett um útreiðslurnar og síðan verður sett á pappír, hvat neyðugt er at selja, fyri at javnvág verður. Men tann, sum ætlar at stovna eina fyritøku hevur ikki minsta ánilsi av um nakað ella einki skil er í ætlanini. Peningastovnarnir fíggja, um teir vænta at fáa pengarnar aftur. T.v.s. um **handilsmaðurin eigur okkurt at panta**, og um ætlanin er burðardygg.

Fyritøkur steðga ikki uttan húsagang

Í dag ger lógin at fyritøkur halda áfram longri enn gott er. Eingin hevur innlit í tí verða hesi feløg ikki keypt upp, men enda í staðin við húsagangi og sanering. Broytingar í lógini hevði gjørt tað møguligt at keypt fyritøkur, sum kláraðu seg undir miðal, áðrenn tær steðga upp. Hetta hevði eisini verið betri fyri eigaran av fyritøku, sum ikki gekk so væl. Í dag veit eingin, um tað loysur seg at geva eitt boð uppá eina fyritøku. Tá samlað søla ikki er upplýst er ógjørligt at meta um hvør klárar seg væl, og hvør ikki klárar seg væl. Heldur ikki kunnu fyritøkur samanlíkna seg við aðrar og ger tað, at **eingin veit, hvat kann gerast betur**.

Kundin fær fyrimunin

Størri vitan hevði gjørt tað munandi lættari at lagt ætlanir. Tær høvdu verið lagdar út frá veruligum tølum Neyvari ætlanir loyva eisini at marginalar verða minni. Eisini er lættari at stýra útreiðslum, tá tú veist, hvussu nógv kemur inn. Tá kann jú ikki keypast upp á forventet fangst, og tað verður heldur ikki ráð til, at eigarin keypur privat upp á P/f til skaða fyri landskassa og palliba.

Tá talan er um kapping viðførur sparing hjá fyritøkum lægri prísir til kundan. Tað er bert kundan ella brúkaran vit skulu hugsa um. Tað skal als ikki takast fyrilit fyri vinnulívsmonnum ella handlum. Eru teir ov nógvir, má onkur gevast. Tað er eingin orsøk hjá kundanum at gjalda meira enn neyðugt.

Kappingarlógin

Neyðugt verður helst eisini at gera greiðari og strangari reglur fyri kappingareftirlitið. Vit hava seinastu árini sæð nakrar sera stórar samanleggingar. Um hetta er til gagn fyri brúkaran er ógvuliga ivasamt. Her hugsi eg um, at skipasmiðjurnar hava sama eigara, Bónus keypti SMS og Miklagarð (og ikki umvent), samanlegging í alivinnuni og Fiskavirking. Ikki tí at hetta ikki skuldi verið loyvt. Men eg ivist stórliga í, um kappingarlógin verjur brúkaran og annars er nøkur forðan fyri at tað, sum líkist monopolfyritøkum, kann gera sum teimum lystir.

Tí skal tað verða mín áheitan á Vinnumálaráðharran um at hyggja eftir, um tað møguliga er skilagott at gera broytingar í nevndu lógum.

Eivind Jacobsen
FO- 490 Strendur

Landsli›i› er væl fyri

Meiri enn helmingurin av li›num spælir í Danmark og Noregi, har føroysku spælararnir høvdu vi›rák í vikuskiftinum

Óli Johannesen hevur veri› tolin í AGF. Nú eydna›ist ta› honum at koma á li›i. Ta› hevur stóran týdning fyri dystarvenjingina og ikki minst fyri sjálvsáliti›

Í hesi vikuni fer ta› mesta at snúgva seg um fyrsta dystin í HM undankappingini. Hann ver›ur sunnudagin klokkan 15. Ta› ver›ur spælt á Svangaskar›i.

Allan Simonsen, sum í vikuskiftinum var í Íslandi og fylgdi føroysku spælarunum, hevur sett sínum monnum stevnu hósdagin. Ætlanin er at venja hóskvøldi›, fríggjadagin og aftur leygardagin.

Meiri enn helmingurin av føroysku landsli›sspælarunum eru uttanfyri landoddarnar. Hesar komandi dagarnar fara teir at manna setrini í flogførunum hjá Atlantsflog. Fyrsti útisetin heim var Sámal Joensen, sum longu í gjár kom úr Reykjavík. John Petersen, Jens Martin Knudsen og Uni Arge koma úr Reykjavík í morgin.

Donsku útisetarnir koma heim hósdagin, og ta› kann væl vera, at teir fara at vera í fer›alagi vi› teir tríggjar í Sogndal.

Fleiri hvíldu

Fleiri av landsli›sspælarunum, sum spæla a›ra sta›ni, hvíldu í vikuskiftinum, tí teir vóru leikbanna›ir. John Petersen og Sámal Joensen høvdu fegnir vilja hjálpt til hjá Leiftri, sum tapti, og Julian Johnsson og Hans Fró›i Hansen høvdu einki havt ímóti dystarvenjing, tá Sogndal vann á Byåsen.

Kurt Mørkøre spældi allar 90 minuttirnar móti Byåsen. Hesa fer› eydna›ist honum ikki at skora. Jens Martin Knudsen hev›i nógv at gera, tá Leiftur tapti í Reykjavík, men ta› ver›ur sagt, at spælandi venjarin stó› seg væl. Allan Simonsen var á sta›num, og hann hevur sjálvur sæ›, hvussu Jens Martin er fyri.

Í gjárkvøldi› var ætlanin, at Allan Simonsen skuldi hyggja at, tá Uni Arge og ÍA skuldu spæla á Laugardalsvøllinum. Næsti dysturin á Laugardalsvøllinum ver›ur, tá Danmark leygardagin skal spæla undankappingardyst móti Íslandi. Allan Simonsen hevur sjálvur gó› minni frá Laugardalsvøllinum. Ta› var har, at hann í 1972 spældi fyrsta landsdystin fyri Danmark, sum vann 5–2. Allan Simonsen skora›i tvey av málunum.

Sjálvsálit í Danmark

Eftir at ta› hevur gingi› strilti› hjá bæ›i FCK og Herfølge glógva›i ta› av álvara í sunnudagin.

Todi Jónsson hev›i sentralan leiklut, tá FCK vann í Parkini á Brøndby. Jákup Mikkelsen hev›i ikki nógv at gera, men fyri hann og Herfølge var ta› týdningarmiki›, at teir vunnu á AGF.

Óli Johannesen hevur veri› tolin í AGF. Nú eydna›ist ta› honum at koma á li›i. Ta› hevur stóran týdning fyri dystarvenjingina og ikki minst fyri sjálvsáliti›.

Øssur í hopla

Teir átta heimligu spælararnir, sum eru í landsli›shópinum, vóru allir í dysti sunnudagin. Hjá Rógva Jacobsen gekk einki serligt. Hann var í 1. hálvleiki á Svangaskar›i óheppin, tá langskot brast í stólpan, og sí›ani var hann lítið sjónskur í spælinum. Bæ›i í 1. hálvleiki, og tá ein tími var farin, sá hann gult og noyddist tískil undir brúsu.

Fró›i Benjaminsen skora›i eitt av teimum seks B68 málunum, men ta› tykist framvegis resta naka› í, á›renn venjingarstø›an ver›ur so gó›, at full nytta fæst burturúr fótbóltsevnunum. Fró›i spældi næstan einki undan summarste›ganum.

Jan C. Dam var í B68 verjuni. Hann spældi skilagott og syrgdi fyri, at eingi mistøk vóru gjørd. Tá KÍ li›i› var nógv undirmanna›, valdi Jóannes Jakobsen at spara Jan C. Dam.

Mest ey›s‡ndi spælarin á Svangaskar›i var Øssur Hansen. Hann hevur neyvan á›ur veri› so væl upplagdur, sum hann er nú. Hann leg›i upp til fleiri av málunum hjá B68. Merkisvert er ta›, at Øssur í B68 hevur sera framrætta›an leiklut. Á landsli›num er hann vongverji vi› nógvum verjuskyldum.

Í Gøtu var Henning Jarnskor meiri sannførandi, enn hann hevur veri› leingi. Í Vági spældi Allan Mørkøre væl.

– Venjingarstø›an gerst alsamt betur, og eg merki einki til ska›an, sum hevur plága›. Men í 2. hálvleiki gekk orkan undan, seg›i landsli›sveteranurin aftaná málleysa javnleikin. Jóhannes Joensen var í sama bor›i sum Allan Mørkøre allar 90 minuttirnar. Hansara uppgáva var at halda tætt. Ta› megna›i hann. Jóhannes var sjáldan vi› í HB álopsspælinum. Ta› var heldur ikki ætlanin, at hann skuldi vera serliga framrætta›ur.

Í Gundadali var Jens Kristian Hansen partur av B36 li›num, sum var vónbrot móti B71. Troystin hjá landsli›svenjaranum er, at li›forma›urin hjá landsli›svenjaranum spælir altí› væl, tá hann er á landsli›num.

JH/JM

Henning til Danmarkar

GÍ- og landsli›sleikarin, Henning Jarnskor, ver›ur eftir øllum at døma ikki vi› GÍ komandi kappingarár

Jákup Mørk

Seinnapartin í gjár fór Henning Jarnskor til Danmarkar, har hann ætlandi skuldi venja vi› anna› hvørt OB ella B1913.

Tá vit um middagsleiti› tosa›u vi› Henning, var ta› enn ikki endaliga avgjørt, hvat av hesum feløgum talan skuldi vera um.

Gjøgnum GÍ

Orsøkin til hetta er, at gentan hjá Henningi er flutt til Danmarkar, og sjálvur roknar hann vi›, at hann flytur av landinum, tá landskappingin í ár er komin at enda.

Hann er tó eisini sáttmálabundin at GÍ komandi kappingarár, og tí vilja gøtumenn royna at leiga hann út til danskt felag, ta› tí› sáttmálin stendur vi›.

Í fyrstu atløgu ver›ur bert ste›ga› tríggjar dagar í Danmark, tí longu hósdagin skal Henning vera á Svangaskar›i, tá Allan Simonsen fer undir fyrireikingarnar til komandi landsli›suppgávuna. Mánadagin komandi gongur lei›in tó aftur ni›ur, og ver›ur hann ætlandi til venjingar har alla vikuna.

Tey bæ›i feløgini, OB og B1913 eru bæ›i heimahoyrandi á Fjóni. OB spælir sum kunnugt í bestu donsku rø›ini, me›an B1913 spælir í næst bestu rø›ini.

Væntandi flytur Henning Jarnskor av landinum í heyst, og tí roynir GÍ nú at finna eitt felag til hansara